

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 04 - 2012

# Oljuprísurin fer at hækka minni enn væntað

Norski oljugreinarin Torbjørn Kjus roynir nú at sissa tey, sum hava sagt, at oljuprísurin bara fer at hækka í komandi árum. Kjus, sum starvast hjá DNB Market, skrivar í einari nýggjari meting um oljuprísin, at í fýra ár hava greinarar sagt, at oljuprísurin má hækka fyri at hava javnvág millum altjóða útboðið og eftirspurningin. Men nú koma broytingar, sigur hann. Greinarin vísir á, at í ídnaðarlondunum er eftirspurningurin eftir olju minkaður, og harafturat er líkt til, at broytingar eru á veg á flutningsøkinum og serstakliga í USA. DNB Market heldur, at í framtíðini fara amerikanararnir at leggja seg eftir at framleiða bilar og onnur akfør, ið brúka náttúrgass, sum USA hevur ovmikið av. -Hetta hendir, samstundis sum amerikanska skiferolju-ævintýrið ger, at USA verður minni heft av at innflyta ráolju úr øðrum londum, og hetta fer at ávirka oljuprísin á altjóða marknaðinum í komandi árum, skrivar Torbjørn Kjus. Niðurstøðan hjá DNB Market er, at oljuprísurin fer ikki at hækka so nógv sum hildið. Í síni seinastu meting segði DNB, at prísurin fór at liggja um 120 dollarar í 2013, men at hann bleiv 135 dollarar í 2014 og 150 dollarar í 2015. Nú eitur metingin 120 dollarar øll trý árini.